# FUNDARBÓK HJÁ VÁGS BÝRÁÐ 2013

<table>
<tr><td colspan="2">Fundur nr. 3<br>Tíð: 14. mars 2013 kl. 19.00<br>Stað: Kommunuskrivstovan</td><td>Skrivari: Petry Joensen</td></tr>
<tr><td>Fastir fundardagar:<br>14. januar, 11. februar, 14. mars,<br>15. apríl, 30. mai, 17. juni,<br>19. august, 23. september,<br>28. oktober, 25. november,<br>19. desember</td><td>Møttir:<br>Allir býráðslimur uttan<br>Sirið Stenberg</td><td>Ikki á Fundi:<br>Sirið Stenberg fráboðað</td></tr>
</table>

**1) Mál nr.: 13/00027** Broyttur roknskapur 2011

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram, tilmæli frá fíggjarnevndini um, at góðkenna broytta roknskapin fyri 2011.
Fíggjarmálaráðið mælir til at íløgan í barnagarð eigur at verða periodisera annarleiðis yvir árini 2011/2012, hetta er einasta broyting í roknskapinum.
Í høvuðsheitum merkir broytingin, at íløgan verður 3,4 mió. minni í 2011, og harvið verður skuldin hjá kommununi lægri við ársenda 2011.
Tað, ið íløgan verður minka við í 2011 skal bókast í 2012 í staðin, so sæð yvir árini eingin broyting.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**2) Mál nr.: 13/00028** Leigu- og avgreiðslugjald

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram, tilmæli frá fíggjarnevndini um, at avtaka avgreiðslugjaldið á 50,00 kr. sum verða lagt á allar rokningar fyri leigugrundir.
Somuleiðis mælir fíggjarnevndin til, at avtaka leigugjøld fyri neystagrundir.
Hetta eri serliga leiga av fáum fermetrum, og stendur inntøkan ikki mát við tær umsitingarútreiðslur hetta førir við sær, samlað fyri Vágs kommunu merkir hetta ein inntøkumiss uppá áleið 8.500,00 kr..

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at avtaka øll avgreiðslugjøld.
Einmælt samtykt, at Vágs kommuna ikki sendir rokningar út, til leigarar av neystagrundum, sum eri undir 300,00 kr..

Undirskriva:

**3) Mál nr.: 13/00033** Offshore Europe í Aberdeen 3 – 6 september 2013

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli frá fíggjarnevndini um, at Vágs kommuna luttekur á messuni 2013, og heitur á býráðið um at játta 100.000,00 kr. sum eykajáttan til endamálið. Málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**4) Mál nr.: 13/00036** Eykajáttan til Vágs Havn, seinni viðgerð

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram, umbøn frá Havnanevndini um eina eykajáttan uppá 1 mió. kr. til Vágs Havn. Eykajáttanin skal nýtast til tað arbeiðið, sum er neyðugt í samband við at Norrøna kemur at sigla á Vág, meðan Smyril er til eftirlit.
Fíggjarnevndin samtykti einmælt á fundi 4. februar, at mæla til at játta hetta av innistandandi. Málið skal hava tvinnar viðgerðir.
Býráðið samtykti einmælt til fyrru viðgerð 11. februar, at játta hetta av innistandandi.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**5) Mál nr.: 13/00037** Eykajáttan til ger av spæliplássi í Vágs skúla, seinna viðgerð.

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli frá undanfarna býráð, um at nýta tann peningin sum oyramerktur er til ung (sum gávur á 100 ára haldinum hjá Vágs kommunu) til ger av spæliplássi við Vágs skúla. Eingin játtan fyriliggur í 2013. Málið skal hava tvinnar viðgerðir.
Býráðið samtykti einmælt til fyrru viðgerð 11. februar, at taka undir við hesum.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**6) Mál nr.: 13/00047** Stuðul til langhylin, eykajáttan seinna viðgerð

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram umbøn um útgjald av stuðli til langhylin.
Býráðið hevur áður játta at veita stuðul til verkætlanina og mælir fíggjarleiðarin til, at stuðulin bert veður útgoldin sum aconto gjøld og eftir áheitan frá sjálvsognarstovninum, og hædd má altíð takast fyri tøka peninginum hjá Kommununi.

Undirskriva:

Fíggjarnevndin samtykt á fundi 4. februar, at mæla býráðnum til at játta 600.000,00 kr. sum eykajáttan av innistandandi í 2013. Málið skal hava tvinnar viðgerðir.
Býráðið samtykti einmælt til fyrru viðgerð 11. februar, at taka undir við hesum.

**Avgerð:**
Dennis Holm var ikki við í viðgerðini, metti seg ógegnigan, Eydis Kjærbo varaborgarstjóri leiddi fundin í hesum málið.
Einmælt samtykt.

**7) Mál nr.: 13/00048** Eykajáttan til arbeiði í Grøna Bólki, seinna viðgerð

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli frá fíggjarnevndini um, at játta 100.000,00 kr. av innistandandi til arbeiðið hjá Grøna Bólki í 2013. Málið skal hava tvinnar viðgerðir.
Býráðið samtykti einmælt til fyrru viðgerð 11. februar, at játta hetta av innistandandi.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**8) Mál nr.: 13/00049** Eykajáttan til skeið luttøku, seinna viðgerð

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmælið frá fíggjarnevndini um at Vágs kommuna luttekur á skeiðinum sum KSF skipar fyri í døgunum 4 til 8 mars 2013 fyri teimum nývaldu kommunustýrinum og at játta 150.000,00 kr. av innistandandi til endamálið. Málið skal hava tvinnar viðgerðir.
Býráðið samtykti einmælt til fyrru viðgerð 11. februar, at taka undir við hesum.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**9) Mál nr.: 13/00052** Kommunustýrisskipan

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram uppskot til kommunustýrisskipan fyri Vágs kommunu. Sambært kommunustýrislógini §5 skal kommunustýrið áseta nærri reglur um síni stýrisviðurskifti í eini kommunustýrisskipan. Uppskot og broytingaruppskot til kommunustýrisskipan skulu hava tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fyriliggjandi uppskot var einmælt samtykti á býráðsfundi 11. februar 2013.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

Undirskriva:

**10) Mál nr.: 13/00053** Fundarskipan

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram uppskot til fundarskipan fyri Vágs kommunu.
Sambært kommunustýrislógini §5 stk. 3 skal kommunustýrið áseta nærri reglur um sína málsmannagongd í eini fundarskipan.
Fyriliggjandi uppskot var einmælt samtykti á býráðsfundi 11. februar 2013.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**11) Mál nr.: 13/00055** Starvsfólkaskipan

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram uppskot til starvsfólkaskipan fyri Vágs kommunu.
Sambært kommunustýrislógini §5 stk. 4 skal kommunustýrið áseta nærri reglur um starvsfólkaviðurskiftini í eini starvsfólkaskipan.
Fyriliggjandi uppskot var einmælt samtykti á býráðsfundi 11. februar 2013.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**12) Mál nr.: 13/00059** Eykajáttan til liðuggerð av barnaansingarstovninum við Kráir, fyrra viðgerð

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmælið frá fíggjarnevndini um, at játtan 1.800.000,00 kr. sum eykajáttan til liðuggerð av barnagarðinum. Eykajáttanin skal nýtast til m.a. planering, asfaltering, stoypa garð, spælipláss og innbúgv.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**13) Mál nr.: 13/00091** Áheitan frá býráðslimi um mál til viðgerðar

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram áheitan frá Conrad Gaard Joensen um at leggja niðanfyri nevndu uppskot fyri á býráðsfundi 14. mars 2013.

1. uppskot

Gera plássi vestanfyri vaskiskúrin "ullavirkið" egna til at campingvognar til summari i ár. Samskipast kann við Stóra Pakkhús, at atgongd verður til wc og bað.

Undirskriva:

2. uppskot
Kanna møguleikan fyri at gera boringar eftir kelduvatnið til drekkivatn hjá kommununi. Samband verður tikið við Jarðfeingi um møguleikan, kostnaðarmeting av boringini.

3. uppskot
Tikið verdur stig til eina langtíðar íløgu til nýggjan bátahyl í Løghamri. Íløgan til betran av bátabrúgvunum í verandi bátahyli verdur brúkt til endamálið. Verandi bátahylur verdur útflytur og bjóðaður út til vinnuvirksemi.

**Avgerð:**

1. Uppskot — Einmælt samtykt, at beina málið í Teknisku nevnd, heitt verður á nevndin um, at taka hetta við í viðgerðina av einum framtíðar campingplássið í Vági. Ynskiligt hevði verði, at uppskot kom fyri á næsta býráðsfundi.

2. Uppskot — Einmælt samtykt, at beina málið í Teknisku nevnd.

3. Uppskot — Tekniska deild skal finna fram tey prosjektini sum fyriliggja um bátahyl og hvat metti kostnaðurin av slíkum er. Kunnað var um at Havnanevndin arbeiðir við at dagføra verandi bátahyl.

**14) Mál nr.: 13/00088** Matrikulering

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli frá Teknisku deild um at játta, umsókn dagfest 28. februar 2013 frá Vágs Timburhandli.
Vágs Timburhandil hevur søkt um at leggja matr. nr. 479 og matr. nr. 23 við Kykslið saman og sundurbýta matr nr. 479 inni í Líðini til 2 matr. nr..

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

Undirskriva: